# Fiskivinnutíðindi úr Grønlandi

*v/ Kára við Sein*

**Kanadiarar fáa góða viðferð**
Eg vil geva eitt lítið dømi um, hvussu gott kanadiarar verða viðfarnir her í Sisimiut. Fyrrverandi Gissur Hvíti, sum eitur OUJUKOAQ, hevur fólk frá landi at rekja teirra svartkalvagørn uppi á kajuni. Eg haldi, at tað høvdu hvørki grønlendskir ella føroyskir fiskimenn fingið loyvi til í Kanada



# Vistferðavinna er skilagóð



**Á áhugaverdu vistferðavinnuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum leygardagin segði stjórin í SamVit, Elin Heinesen, at vistferðavinna í fyrsta lagi er skilagóð fyri heimin og mentanina kring um okkum, men faktuellu tølini siga okkum eisini, at hetta slag av ferðavinnu so sanniliga eisini er góð fyri pengapungin**

VISTFERÐAVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í røðu síni á vistferðavinnu ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum leygardagin legði stjórin í SamVit, Elin Heinesen, dent á, at stevnan ikki minst hevur til endamáls at gera okkum í Føroyum meira varug við virðini í okkara náttúrliga og mentanarliga tilfeingi.

Hon reisti eisini spurningin, hvat krevst fyri at verja hetta tilfeingið, og hvussu fáa vit eina burðardygga vinnu burtur úr hesum.

Elin gjørdi eisini nógv burtur úr at greiða frá, hvat ein vistferðavinna, sum á donskum verður rópt økoturisme, í veruleikanum er.



*- Tá tey í Íslandi friðaðu ávís øki og settu tey av til tjóðargarðar ella nationalparkir fleirfaldaðist talið av ferðandi til hesi støð. Inntøkurnar frá teimum vitjandi geva yvirskot og fíggja væl og virðiliga umsitingina av tjóðargørðunum, segði Elin Heinesen, stjóri í SamVit*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Tey svala á sær uttanfyri Norðurlandahúsið í steðginum sum er millum áhugaverdu fyrilestrarnar um vistferðavinnu*

*Mynd: Vilmund jacobsen*

## Mentanarligur arvur

- Hetta er eitt slag av ferðavinnu, sum talar til vistfrøðiliga og sosiala tilvitan. Yvirhøvur snýr vistferðavinna seg um mentan, náttúruupplivingar, sjálvbodna arbeiðsmegi, persónliga menning og um at nema sær vitan um ymiskar livihættir á klótuni. Náttúran, dýra-og plantulív og mentanarligi arvurin eru fremstu atdráttir hjá einum ferðamáli fyri vistferðafólkið.

Hon segði, at skal burðardygg menning av vistferðavinnu eydnast, er neyðugt at taka bæði sosial, fíggjarlig og umhvørvislig atlit.

- Burðardygg ferðavinna er ferðavinna, har tørvurin hjá tí ferðandi verður nøktaður, samstundis sum dentur verður lagdur á at verja og betra um møguleikarnar hjá næsta ættarliði og fyri framtíðina sum heild, segði Elin.

Bæði innan vistferðavinnu og burðardygga ferðavinnu verður dentur lagdur á at varðveita náttúruna og betra um støðuna hjá lokalu íbúgvunum.

- Tey, ið fáast við vistferðavinnu, hava nakrar meginreglur at halda seg til. Ein grundleggjandi regla er til dømis at skapa tilvitan um og virðing fyri náttúruni og mentanini, samstundis sum tað er týdningarmikið at skapa positivar upplivingar, bæði fyri hin vitjandi og tann, sum er vertur fyri ferðafólkunum.

## Veksandi vinna

Stjórin í SamVit segði, at vistferðavinna byrjaði at taka dyk á seg í nítiárunum og er síðan vaksin við 20-34% um árið.

- Vistferðavinnan og náttúruferðavinnan vuksu í 2004 tríggjar ferðir skjótari í altjóða høpi enn tað, sum vit skilja við vanligari ferðavinnu.

Hon segði, at tað sum rópt verður "sól og sand" ferðavinna verður mett at hava havt sínar bestu dagar. Hinvegin er upplivingarferðavinna, eitt nú vistferðavinna, millum tær vinnur, ið verða mettar at fara at veksa skjótast komandi 20 árini.

Elin nevndi eisini fleiri dømi um teir fíggjarligu fyrimunirnir, sum eru við vistferðavinnu í mun til tað, sum rópt verður hópferðavinnu.

- Í Dominika í Karibia brúka tey vitjandi, sum búgva í smáum smáttum, 18 ferðir meira pengar á staðnum enn fólk, ið koma við ferðamannaskipum til oyggjarnar. Í Komodo National Park í Indonesia brúka ferðafólk, ið ferðast sjálvi, nærum 100 US$ fyri hvørja vitjan, meðan fólk í ferðaløgum bara leggja helvtina av hesari upphædd eftir sær. Ferðafólk av ferðamannaskipum brúka í meðal tríggjar cent í lokala umhvørvinum. 80% av kostnaðinum fyri ferðir við øllum íroknað fara til flogferð, gistingarhús og onnur altjóða feløg. Vistferðafólk brúka harafturímóti lokalar veitingar og leggja í nøkrum førum heili 95% av samlaðu upphæddini eftir sær á staðnum.

## Tjóðgarðar

Stjórin í SamVit segði, at tað at friða økir, merkir ikki, at økini ikki mugu vitjast, men vitjaninar skulu bara vera undir eftirliti.

- Tá tey í Íslandi friðaðu ávís øki og settu tey av til tjóðargarðar ella nationalparkir fleirfaldaðist talið av ferðandi til hesi støð. Inntøkurnar frá teimum vitjandi geva yvirskot og fíggja væl og virðiliga umsitingina av tjóðargørðunum.

Hon segði, at meira enn tveir triðingar av ferðandi úr Amerika og Avstralia – og 90% av teimum ferðandi úr Bretlandi – halda, at